gult4 cyan4 magenta4 svart4

Renna flógvan sveita

Marita Simonsen er ein av stigtakarunum til felagið Blóðgevi
Mynd: Jens K. Vang

Umleið 1.100 fólk eru i blóðgevaraliðnum á Landssjúkrahúsinum. Hesi hava nú møguleika at gerast limir í felagnum Blóðgevi

HEILSUMÁL
Edvard Joensen

Landssjúkrahúsið: Teir umleið 1.100 blóðgevararnir á Landssjúkrahúsinum fáa nú høvi at skipa seg í felag. Her fyri varð felagið Blóðgevi stovnað. Felagið hevur til endamáls at útvega sjálvbodnar blóðgevarar til Landssjúkrahúsið og saman við øðrum tílíkum felogum í Føroyum at tryggja, at sjúkrahúsini í Føroyum fáa nóg mikið av blóði.

Tað steðgar ein bilur uttanfyri. Hann er sendur av Blóðbankanum á Landssjúkrahúsinum eftir blóðgevanum (donorinum), sum eftir avtalu skal lata blóð í Blóðbankanum.

Blóðbankin heldur til á tríðju hædd á Landssjúkrahúsinum. Har er, sum vanligt teir dagarnar, tappað verður, væl av fólki . Onkur situr í gongini og bíðar. Onkur situr við eitt borð í rúminum við síðuna av sjálvum tappirúminum og fyllir út eitthvørt spurnarskjal, meðan upp aftur onkur annar liggur í stólinum, meðan tappað verður.

– Ger so væl og set teg niður, sigur fryntligi bioanalytikarin, sum tekur ímóti.

Hon setir seg við eina teldu og spyr um navn og føðingardag. Løtu seinni kemur eitt ark, sum nú er vorðið eitt spurnarblað, úr prentaranum. Har eru ymsir spurningar, blóðgevin skal svara uppá.

Navn, bústaður og føðingardagur eru longu á. Rímiligt. Tey hava tað jú liggjandi frammanundan.

So er at svara, um ein hevur verið sjúkur seinastu tíðina. Verður heiligvágur tikin? Hvusu við fremmandum konufólki? Hvar hevur tú ferðast seinasta hálva árið? Konufólkini skulu svara, um tey eru - ella hava verið - upp á vegin, síðan seinastu tapping.

Alt samalt spurningar sum svaraðir eru so mangan. Og so ein nýggjur niðast á blaðnum: Ynskir tú at gerast limur í felagnum Blóðgeva?

Svarið er greitt: Ja!

Brúk fyri blóðgevarum

Tað verður farið inn í tappingarrúmið. Tríggir stólar standa á rað, har blóðgevarin kann leggja seg í, meðan tappað verður.

Ein fryntlig kvinna tekur í móti og biður blóðgevaran finna sær pláss, har best er. Ein stólur er upptikin, so tann mittasti verður valdur.

Hon kemur við blóðposunum. Teir eru tríggir, tí blóðið verður sentrifugerað, eftir at tað er tappað. Tá liðugt er, eru tríggir ymsir úrdráttir, sum allir kunnu brúkast hvør sær, greiðir hon frá. Og teir fara so í hvør sín posa, uttan at neyðugt er at seta hol á nakran teirra.

Posin veðrur lagdur á eitt tól, sum er ein vekt, ið samstundis ristir blóðið. Ein hálvur litur av blóði, ið er nøgdin, tappað verður hvørja ferð, vigar út móti einum pundi, so tað lættari verður ein helst í dag, verður semtandi tikið til.

So smyr hon spritt á armin og setir ein nál í, haðani ein kløn slanga gongur niður í posan. Og tað er beinanveg, at tað fer at renna gjøgnum kláru slanguna.

Marita Simonsen, bioanalytikari í Blóðbankanum - sum forrestin man vera einasti bankin, nógvir gevarar seta inn í - er ein stigtakari til felagið Blóðgevi. Hon er eisini nevndarlimur í felagnum.

Í nevndini sita umframt Maritu Simonsen eisini Gunrið Jóanesarsson, bioanalytikari, sum eins og Marita umboðar Blóðbankan, Heðin Thomsen, umboðandi læknarnar á Landssjúkrahúsinum, Jóan Hendrik Winther Poulsen og Randi H. Jakobsen, sum umboða vanligu blóðgevararnar. Nevndin hevur ikki skipað seg enn.

Marita greiðir frá, at allir nevndarlimirnir eru blóðgevarar ella fyrrverandi blóðgevarar. Tað er nevniliga soleiðis, at felagið eisini er fyri fyrrverandi gevarar.

Ókeypis limaskapur

Endamálið er at fáa so nógvar blóðgevarar á Landssjúkrahúsinum sum gjørligt at gerast limir í felagnum, sigur Marita Simonsen. Helst allar. Og ongum nýtist at ivast, tí limagjaldið er ókeypis.

Hinvegin fylgja fyrimunir við gerast limur, sigur hon. Sum felag ber til at fá eina ávísa peningaupphædd frá Almanna- og Heilsumálastýrinum, sum felagið so kann brúka til limarøkt av ymsum slagi. Eitt nú smálutum, sum kunnu gera tað áhugavert hjá fólki at tekna seg sum blóðgeva. Ella tryggja blóðgevararnar, um eitthvørt skuldi hent teimum, meðan tappað verður. Tað kann vera so



Landssjúkrahúsið hevur altíð brúk fyri blóðgevarum
Mynd: Jens K. Vang

einfalt sum at blóð kemur á eina skjúrtu og ikki fæst úr aftur, soleiðis at skjúrtan er oyðiløgd.

– Tá kundi til dømis tryggingin hjá felagnum tikið við, heldur Marita Simonsen.

Í endamálsgreinini í lóg felagsins stendur millum annað, at ....Felagið skipar fyri fundum og øðrum tiltøkum til frama fyri limirnar.

Felagið skal umboða blóðgevararnar í øðrum felogum so sum Blooddonorerne i Danmark og í altjóða felogum fyri blóðgevarar.

Marita Simonsen greiðir frá, at hetta felagið er ikki tað einasta í Føroyum. Í grundini er íbláturin komin frá einum sera virknum felag, sum blóðgevarar við Klaksvíkar Sjúkrahús hava.

So floytar í vektini niður við stólinum. Hon sigur frá, at posin er fullur. Marita setir eina klemmu á slanguna, so ikki rennir meira. Síðan tekur hon nálina úr og heftir eitthvørt á armin, so ikki bløðir.

Eina lítla kurv við ymsum gløsum hevur hon, har hon hevur tikið ávísar blóðroyndir í. Alt verður merkt við nummari og blóðflokki, so ikki bland kemur í.

Tá liðugt er, kemur hon við eini fløsku av Sisu, sum drukkin verður teir tíggju minuttirnar, bíðað verður í stólinum eftir at tappað er.

Stólurin vinstru megin er upptikin. Maðurin, sum lá í stólinum høgrumegin, er farin, og annar komin í aftur. Og úti í gongini situr ein blóðgevi aftrat og bíðar eftir, at sleppa í tann mittassta stólin, sum veðrur tómur um nakrar fáar minuttir.

Joakim kann keypa Koltur

Sambært uppskotinum um framtíðar landbúnaðarpolitikk í Føroyum, er í grundini einki sum forðar fyri, at Joakim prinsur keypir øll kongsfestini í Føroyum, um landsstýrismaðurin góðkennir hann sum egnaðan keypara

LANDBÚNAÐUR
Edvard Joensen

Eitt av aðalmálunum í nýggja landbúnaðar-politikkinum er, at festini skulu kunna seljast privatum. Og tað kunnu bæði vera privatpersónar, partafeløg ella onnur feløg, sum landsstýrismaðurin góðkennir.

Avleiðingin kann í ringasta føri gerast, at eitt nú Joakim prinsur fer at keypa Dímun ella Koltur við vælsignilsi frá landsstýrismanninum við vinnumálum.

Sjálvandi eru avmarkingar gjørdar, sum skulu forða slíkum handlum. Eitt nú við at lata verandi festara fáa forkeypsrætt, um hann annars verður mettur egnaður til tess.

Men ókent er ikki í øðrum sambandi, at fremmandur kapitalur og eigari koma inn í vinnuna gjøgnum strámenn. Og her kann orðið strámaður fáa bókstaviligan týdning.

Lagt er kortini upp fyri slíkari sølu í tann mun, tað ber til. Í uppskotinum um framtíðar landbúnaðarpolitikkin, sum landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur fingið, stendur, at søla av almennari jørð til privatar verður bert loyvd treytað av, at keyparin lýkur ásetingarnar sambært lóg um sølu av almennari búnaðarjørð. Tí givið er, at ognarrættindi til búnaðarjørðina skulu vera varðveitt hjá teimum, sum hava neyðugan førleika og annars lúka ásetingarnar í lóggávuni fyri at sita við garði.

Hvørjar lógarásettu treytirnar eru, verður ikki sagt í niðurstøðuni, Sosialurin hevur fingið innlit í. Men um gingið verður eftir orðingini um, at keyparin skal hava neyðugan førleika til at reka jarðarbrúk, er eingin forðing fyri, at eitt nú Joakim prinsur, sum er útbúgvin á økinum, keypir bæði Dímun og Koltur.

Tó er tað bert dyrkaða lendið og tilhoyrandi bygningar og maskinur, sum keypast kunnu sambært uppskotinum. Men bóndin fær móti einum rímiligum árligum gjaldi beitisrætt í haganum. Hagi, fjøll og ódyrkað lendi veðrur varðveitt á almennum hondum, stendur í uppskotinum.

Hvussu verður við øðrum lunnindum so sum fugli, verður ikki nevnt í samandráttinum, Sosialurin hevur fingið innlit í.

Nevnda dømi við prinsinum er sjálvandi eitt hugsað dømi, og greitt verður sagt í uppskotinum, at ætlanin er ikki, at spekulatón skal koma uppí.

Uppskotið, sum gevur møguleika fyri keypi og sølu av almennari jørð, áleggur kortini ongum at keypa garðin, hann hevur fest. Og roknað verður eisini við, at fleiri festarar fara at halda fram eftir verandi skipan við festigjaldi.

Men fyri at javnseta hesar festarar og teir, sum keypa jørðina, verður festigjaldið ásett javnt við rella gjaldið fyri yvirtiknu garðarnar, soleiðis at sleppast kann undan kappingaravlaging.

Búgvið í Caravan

Hugnið tykkum í Skotlandi



Atlantic Airways Caravan í Nairn.
Vit hava tveir eksluisvar "Caravans", sum vit hava serútgjørt til føroyingar. Teir standa á vakra Nairn økinum sum liggur út til strandina.
Nossligu og vælútgjørdu vognarnir eru heilar 42 fermetrar og hava umframt allan vanligan útbúnað, alskyns hentleikar so sum: sjónvarp, video, stereoanlegg, mikroovn, føroyskar leikur, -bøkur og -videobond. Knýtt at økinum er spælipláss, svimjihylur (innandura), hitarúm, solarium, minigolf o.a.

Nairn:
Nairn Lochlny er vakurt umráði framvið Moray-fjørðin. Tað tekur 20 minuttir til Inverness og 1 tíma við toki til Aberdeen. Tað tekur 10 minuttir til gongu til miðbýin í Nairn.

Dømi:
Frá høsdegi til høsdag.
Um 2 vaksin og 2 børn undir 12 ár ferðast saman.

Við í prisinum er fog og tokterð, gisting og kaliskápið er fult við mati tá ið tit koma. Galdandi frá 31. mai - 02. juli.

8.528,-*

Prísir fyri hvønn um:
6 ferðast saman: 2.627,-*
8 ferðast saman: 2.470,-*

*) Ferðatrygglið sum í leitans er kr. 474,- fyri vaksin og kr. 354,- fyri børn kostar aftast prisinum.

Vit hava tveir "Caravans", ein til 6 og ein til 8 persónar.

MB-Tours M3
Tel: 32 21 21 - Fax 32 21 22

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 40 - Fax 34 10 01
www.atlantic.fo